Dimmalætting

Heimatíðindi

# - Einstaklingurin hevur størri rásarum enn fyrr




*Mynd: Jens Kristian Vang*


RUTH WINTHER POULSEN | 2018-07-19 17:03

Tøl frá hagstovuni vísa, at talið á ungum, sum flyta til Føroyar, er vaksandi. Fleiri orsøkir eru til hesa gongdina, eitt nú betri umstøður, tá tað kemur til arbeiði, inntøku og útbúgving.

Samstundis eru tað eisini tær subjektivu fyritreytirnar, sum eru betraðar, og hetta snýr seg um, hvussu einstaklingurin uppfatar lívið, sigur Hans Pauli Strøm, sosiologur á Hagstovuni. Tá er talan millum annað um mentunarlív.

- Í tí føroyska mentunarlívinum er hent kolossalt nógv tey síðstu 5-10 árini. Upplivingartilboð, sum man fyrr bara kundi lesa um og hoyra um í stórbýum so sum Keypmannahavn, London og ymsa aðra staðni - nógv av tí kanst tú nú eisini uppliva í Føroyum.

Tilboðini eru fleiri, og fólk kunnu nú njóta fleiri mentanartilboð, eitt nú innan tónleik, og listaframsýningar.

- Hetta her, sum summi ógvuliga ironiskt ella niðursetandi kallar ‘café latte mentanin’, at man kann fara á café og sita og hugna sær, enntá sita uttandura. Øgiliga nógv av hasum har var ikki tilstaðar fyri eini 10 árum síðani í Føroyum, men tað er tað nú.

Føroyingar kunnu tískil fáa ein smakk av tí sama lívinum, sum fólk annars uppliva í teimum stóru býunum. So tað at man flytir heim til Føroyar ella at man velur at vera verðandi í Føroyum inniber ikki, at man missir nakað, leggur hann afturat.

**Samfelagið er meira tolerant**

Umfrant at hava fingið eitt ríkari mentunarlív, eru tað eisini onnur ting, sum gera tað meira dámligt at búgva í Føroyum. Samfelagið er meira opið og tolerant, sigur Hans Pauli Strøm.

- Her tosi eg ikki bara um tað, sum er tað mest markanta, sum er uppfatanin av samkyndum og teirra lívsmøguleikum men yvirhøvur, at man er meira opin og meira tolerantur. Harvið kann man skerma víðari lívsformar enn tað fyrr bar til.

- Fyrr var lívið ógvuliga stíft og man var so konformur, øll skuldi næstan líkjast hvørjum øðrum. Nú er ein størri víðskygd, ein nógv størri toleransa fyri at einstaklingurin kann útfolda seg. Einstaklingurin hevur størri rásarúm nú enn

hvat man hevði fyrr í Føroyum, og tað eru størri møguleikar fyri at liva sítt egna lív.

Like Share Be the first of your friends to like this.

**0 Comments** Sort by **Oldest**



Add a comment...

Facebook Comments Plugin

Sum haldari fært tú atgongd til alt tilfar í blaðnum á netinum, umframt tíðindi.
Trýst á "**Tekna hald**" og skráset teg

---

## Dimma Pluss og prent

kr. 129 / mðr

## Dimma Pluss

kr. 99 / mðr

## Dimma Pluss og Prent 365 dagar

kr. 1548 / 365 dagar